# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um elskaðu ommu og abba mín

## Charlotta og Johan Christiansen,

### Porkeri



Góðu omman og abbin.

Ja, nú eru tit sloppin heim til tann æviga bústað. Tit løgdu bæði árarnar inn næstan í senn. Abbin 1. august og omman 12. september, 6 vikur ímillum tykkum.

Hetta er ein tung tíð og tómrúmið er ómetaliga stórt. Tað var altíð so gott at koma út til Porkeris til tykkum, tit tóku altíð ímóti okkum við opnum ørmum, og vit blivu passaði og pleygaði so væl.

Tit vóru so góð við okkum øll. Abbin fortaldi altíð onkra góða søgu ella onkra serliga hending, sum honum hevði verið fyri.

Minnið, sum abbin hevði, unnast ikki øllum at fáa. Tað var altíð so hugnaligt at hoyra hann. Og omman við sínum lætta og góða sinni.

Tá hon hugnaði um okkum við sínum heimabakaðu kakum og teimum góðu klattunum.

Tit vóru so góð og fitt, altíð vóru tit eins móti okkum øllum. Eisini tá tit fingu vitjan av langommu og langabba børnunum, tá livnaðu tit veruliga upp.

Tey seinastu árini eru tit vorðin meira troytt, tit fingu loyvi at vera heima og tit blivu passaði væl av Sverra gubbanum, og heimahjálpirnar hava verið trúgvar. Sverri gubbin, tú hevur verið fantastiskur.

Góðu omman og abbin. Túsund takk fyri alt tit hava verið fyri meg og okkum. Má Jesus pápi hjálpa og styrkja okkum ígjøgnum hesa sváru og tungu tíð.

Takk fyri alt.

**Yvonna**

# Annfinn Petersen

## in memoriam

### f. 3.10.1953, d. 6.6.2004



Tann 3. oktober kundi Annfinn havt fylt 52 ár. Hann andaðist fyri góðum ári síðan - mitt meðan summarið var uppá sítt fagrasta. Á tílíkum aldri, kundi Annfinn havt sítt lívs summar; men so skuldi ikki verða.

Annfinn var yngstur av sjey børnum hjá Ninnu og Niclasi Petersen í Rituvík. Vit vóru javngamlir. Spældu nógv saman, alt tað eg kann minnast. At koma inn til Ninnu og Niclas hevði altíð ein serstakan hugna yvir sær. Hetta var eitt stað, har tú altíð kendi teg vælkomnan. Nú býr Mogens í húsinum, sum einasti sonur á lívi. Systirin Inger býr í Australia. Hini eru øll - eins og foreldrini - farin foldum frá: Annlina, Kala, Hans Petur og Pedvin.

Annfinn var ein evnagóður drongur, ið hevði ríkar gávur til mangt og hvat - t.d. tekniskt snildi og hegni. Hann hevði listarligar gávur, ið sýndu seg í góðum tekningum á ungum árum, eins og hann tíðliga var kringur við gittara og tangentum. Eitt skifti spældi hann í orkestrinum "Drifters" á Glyvrum.

Hugurin stóð tó mest til tað tekniska, soleiðis at hann søkti um at fáa læruplass sum radiomekanikari í Klaksvík, sum 17 ára gamal. Tríggjar vóru umsóknirnar. Lutakast bleiv, og luturin fall á Annfinn. - Soleiðis bendist hansara lívskós í Norðoyggjar, har hann eisini fann sær gentu. Annfinn og Ann giftust 25.10. 1975 og fingu tveir synir, Leif (26 ár, f. 1979) og Niclas (15 ár, f. 1990).

Annfinn var ein persónur, ið var góður at heita á og kundi fáa alt tekniskt í ordan, hvat tað so var. Hann arbeiddi altíð nógv og spardi seg ongantíð. Fyri nøkrum árum síðan fór heilsan at bila. Og knappliga í fjør summar vóru boð eftir honum - lívsfjørðurin var rógvin.

Hin 27. august í ár var realskúlaflokkurin á Glyvrum, har Annfinn gekk, savnaður til 35 ára hald síðan loknan skúla. Vit vóru á grøvini hjá Annfinn úti við Borðoyavík. Til hetta høvið yrkti Arnfríður í Skálafirði hesar reglur:

*Góði Annfinn,*
*tú vart ein av okkum,*
*og framvegis ert.it minnast teg,*
*so sum tú vart.*
*Í alheimi viti ein*
*slóknaður er.*
*Tó hjá okkum*
*hann enn lýsir bjart.*

Hvíl í friði, góði Annfinn.

**Dánjal Petur**

# Fýra næmingar og ein skúli

**Dalur:** Tað eru ikki teir nógvu næmingarnir í Dals skúli. Men teir duga at hugna sær kortini.

Henda dagin fyrr í mánaðinum tá vit vitjaðu skúlan høvdu teir fýra næmingarnir allir somu lærugrein — føroyskt. Lítið var eftir av tímanum, tá vit komu innar í skúlastovuna, og løtu seinni fóru tey út í túnið — skúlagarðin — at spæla í góðveðrinum. Her hoppaðu tey og høvdu eisini spælt eitt spæl, har tey høvdu kritað óført niður í asfaltið.

Lærari í skúlanum er Ragna Leivsdóttir, sum hevur verið lærari í 11 ár.

Í skúlanum eru tey bert fýra næmingar — tríggjar gentur og ein drongur. Genturnar eita Bjørt Poulsen, sum gongur í 1. flokki; Róa Poulsen sum gongur í 3. flokki og síðani Trina Larsen og Martin Súni Johannesen sum ganga í 4. flokki.

Tey ganga í Dals skúla til tey fara í 6. flokk. Tá fara tey í Meginskúlan á Sandi.

**sb.**



*Bert fýra næmingar eru í Dals skúla. Tey ganga her til og við 5. flokk. Í 6. flokki fara tey á Meginskúlan á Sandi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*